



# Føroyski tónleikamarkn



*– Hetta fer heilt sikkurt at hava positiva ávirkan á Føroyar sum heild, tí tað kemur fokus á land og mentan, sigur Christian Hald Buhl, fyriskipari av føroyska sýnisglugga tiltakinum Atlantic Soundscapes, sum verður í Belgia í mai*

**- Tað nyttar einki at oysa milliónir í tónleikaátøk í londum sum Onglandi ella USA, ið longu eru á tremur við tónlistarligari vøru. Tú mást byrja á einum marknaða, ið hevur pláss, og síðani arbeiða teg víðari harfrá, sigur Christian Hald Buhl, ið 3. mai hevur stórt showcase fyri føroyskan tónleik í Brussel, Belgia, kallað Atlantic Soundscapes**

Christian Hald Buhl er tónleikaelskari. Hann er dani men er uppvaksin í Brussel. Sum ungur var hann rokktónleikari og manageari fyri ungar rokkbólkar. Í dag hevur hann eina masters í Business Administration, arbeiðir á donsku sendistovuni í Brussel ígjøgnum fyritøkuna hjá sær The Rocking Factory og er íverksetari og fyriskipari av sýnisglugga tiltøkum í londum sum Fraklandi, Hollandi, Belgia, Týsklandi, Sveits, Eysturríki og Luxemburg.

Hjartamálið hjá honum er at promovera nordiskan tónleik. Í hesum døgum er tað tónleikur úr Føroyum, sum er ovast á listanum. 25 føroysk tónleikanøvn eru av einari dómsnevnd kókað niður í fýra bólkar, ið skulu luttaka á Atlantic Soundscapes í mai. Teir eru Orca, Budam, Gestir og Boys in a Band.

## Norðurlendskt er sterkt

Christian kom í samband við føroyskan tónleik fyri nøkrum árum síðani, tá føroyska og danska sendistovan í Belgia enn vóru í sama húsi. Hann ásannaði skjótt, at tað er eitt sterkt brand at vísa á, tá tónleikur er norðurlendskur.

- Eg trúgvi, at ein av orsøkunum til, at norðurlendskt er eitt so sterkt brand, er, at tónleikurin er bersøgin og erligur. Tað, at landið er so lítið, ger, at ein hevur lættari við at hugsa, at »vit koma ongantíð út alíkavæl«. Hetta elvir til, at bólkar tora nógv betri at gera egnan tónleik, sum hevur eitt serligt ljóð. Tað er hesa erligheitina og hetta ljóðið, ið eg vil bera fram til Atlantic Soundscapes, greiðir Christian frá.

Í løtuni er »Iceland on the Edge« á skránni í Belgia, har upp til 30 íslendskir bólkar fara at framføra teir tveir næstu mánaðarnar við høvuðsnøvnum sum Ólafur Arnalds og Múm. Umframt tónleik verður eisini onnur íslendsk list og bókmentir víst fram, og í mai mánaða eru Føroyar í sjóneykuni.

## Samstarv í allar ættir

Christian kom á G! Festival í fjør, har hann fekk mest sum allan tann tónleikin presenteraðan, ið hann arbeiðir víðari við nú.

- G! gjørdist ein platformur til Atlantic Soundscapes. Eg kom ígjøgnum G! í samstarv við Norðurlandahúsið, Samvit og uttanlandaráðið. Kristian Blak hjálpir eisini nógv til, hóast TUTL offisielt ikki er við í hesari verkætlanini. Í samstarv við Tutl er ein onnur verkætlan í gongd, Tutl Touring, sum tekur støði í at uppbyggja fjepparabasar fyri føroyskar bólkar í ellivu ymsum londum, harímillum eisini á Benelux marknaðinum. Hetta skal gerast ígjøgnum konsertferðir og distribuering av fløgum, sigur hann.

## Týdningarmikil fólk til týdningarmikla vinnu

Sambært Christiani hendir tað ov lætt, at onnur lond taka okkara nøvn. Tí mugu vit skapa eina álvarsama tónleikavinnu í Føroyum, sum ger, at tað, ið verður skapt her, kann koma aftur til okkum. At tann vøran, ið spírir í okkara landi, blívur við at vera úr Føroyum og ikki endar í Danmark, Íslandi ella aðrastaðni. Fyri at kunna menna føroyska tónleikamarknaðin upp á hetta støði, mugu vit gera eitt gott tiltak í einum umhvørvi, sum hevur áhuga. Saman við fólki, ið veit, hvat tað snýr seg um.

- Bólkarnir, ið skulu framføra á Atlantic Soundscapes, eru valdir út av týdningarmiklum fólki í belgisku tónleikavinnuni. Dómsnevndin stendur av